**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos

# Úr Brasil til Føroya at hoyra Elton John

FÓLK ÚR ØLLUM **HEIMINUM** KOMA TIL **FØROYA** AT HOYRA **ELTON JOHN**. TVEIR, VERULIGIR **FJEPPARAR** KOMA ALLAN VEGIN ÚR **BRASIL** TIL FØROYA


*Feðgarnir Daniel og Giovani koma úr Brasil til Føroya at hoyra Elton John*




Giovani de Matos og 13-ára gamli sonur hansara Daniel, ferðast yvir 13.500 kilometrar fyri at koma til Føroya at hoyra Elton John. Teir búgva í býnum Florianopolis, sum er á oynni, Santa Catarina Island, í Suðurbrasilia.

Báðir eru stórir tónleikafjepparar, og tá møguleikin, at bæði uppliva Paul McCartney og Elton John var til staðar, bílagdu teir ferðaseðilin til Evropa.

– Vit ferðast úr Sao Paolo til London og Cardiff, har Paul McCartney hevur konsertir 26. og 27. juni. Frá London fara vit til Keypmannahavn, og síðan víðari til Føroya at uppliva Elton John, greiður Giovani de Matos frá.

Hann er fyrrverandi bankastjóri í Sao Paolo, sum nú starvast sum ráðgevi. Bæði hann og sonurin Daniel dáma væl at ferðast, og teir hoyrdu fyrstu ferð um Føroyar frá einum granna, ið hevði sagt at Føroyar var eitt av vakrastu støðum hann nakrantíð hevði vitjað.

### Dreymur gerst veruleiki

Fjepparar, sum teir báðir eru, avgjørdu teir, at konsertirnar hjá Paul McCartney og tann hjá Elton John skuldu ikki fara framvið í ár. Teir kannaðu hvar hesir báðir skuldu spæla í Evropa, og »Bingo« – Føroyar, sum teir áður høvdu hoyrt um, fekk vitjan av Elton John.

– Tað hendir ikki oftani, men tað var also kærleiki við fyrsta eygnabráð, tá vit sóu myndir úr Føroyum, sigur Daniel de Matos.

At sleppa at síggja Føroyar og hoyra Elton John er ein dreymur, sum gerst veruleiki hjá teimum.

Dennis Holm hjá Fivestar sigur, at nógv fólk úr Onglandi, Íslandi og Danmark koma til konsertina.

At tað er ein solokonsert, ið Elton John fer at hava í Føroyum, er eisini nakað, ið fólk ferðast eftir.

– Vit hava fingið at vita frá fólkinum rundanum Elton John, at ein solokonsert er ógvuliga eksklusiv.

Solokonsert inniber, at tað verða Elton og klaverið á pallinum, og onki annað.

## Bryan Adams opnaði hurðina fyri Elton John


*Væleydnaða Brian Adams konsertin á Tórsvølli*

At fáa ein heimskendan sangara sum Elton John til Føroya er onki ein ger eftir einum degi.

Fyrireikingarnar og umbønirnar hava tikið langa tíð.

– Í byrjanini, tá man skal skipa fyri konsertum, fær man onki svar upp á sínar umbønir. Um tað so eydnast at fáa onkran kendan til Føroya, gerst tað eitt sindur lættari, greiðir Dennis Holm á Fivestar frá.

At Kris Kristofferson og Bryan Adams vóru í Føroyum fyri nøkrum árum síðani vísti seg at hava stóran týdning, tá Fivestar vildi hava Elton John til Føroya.

– Gittaristurin hjá Bryan Adams og dóttir managaran hjá Elton John kennast væl. Tá tey hittust til brúdleypið hjá síðstnevndu síðsta summar, fór tosið inn á Føroyar, og hvussu væl nøgdur Bryan Adams hevði verið við vitjanina, greiður Dennis Holm frá.

Hetta vakti áhugan hjá fólkunum rundan um Elton John og konsertin í Føroyum gjørdist veruleiki.

– Um tað eydnast líka væl við hesi konsertini, kunnu vit kanska fáa nøvn sum Rolling Stones ella Bon Jovi hendanvegin, droymur Dennis Holm.



FIVESTAR

## Halló Dennis Holm

***Hvussu gongur við fyrireikingunum til konsertina?***

**– Jú, vit høvdu kunna havt konsertina ímorgin. Tað mesta er komið upp á pláss.**